Skemt




MYND: ÁLVUR HARALDSEN

# Klovnur á Rás2

Í vikuni var rættiligt lív í á Rás2. Fólk frá Sirkus Baldoni vitjaðu rásarúmiðí Vágsbotni, men spurningurin er, um fólk halda, at studio hjá Rás2 altíð sær soleiðis út.



## Tá skemtarin verður til grin

Í vikuskiftisblaðnum Summar í Sosialinum hevur ymiskt lætt og skemtiligt verið tikið fram á síðu 2. Soleiðis var eisini í farnu viku, men tá riggaði tað kanska ikki heilt at spæla stuttlig. Onkur hevði funnið eina mynd av Bjørn Kalsø við yvirskriftini »Hvørki fuglur og fiskur«. Síðani var lagt upp til, at sjálvandi var tað hvørki fulgur ella fiskur men »Bjørn Kallsoy«. Jamen, vit siga bara royn umaftur. Og soleiðis endaði skemtið í Sosialinum sum skemt í Sosialinum.



...iv pris gælder
...un til 19.09.10 (herefter 99 kr./md.)

Avis Mobil eBladet Abonnement Annoncer Shop Startside

Ekstra Bladet

Forsiden lige nu: Caroline gav Chang to æg

.tv lige nu: ... Berlin: Her ... Samsungs ...

Forsiden Nyheder Sport Fodbold flash! TV nationen! kup! Biler

Nyheder 112 Samfund Politik Krig & katastrofer Videnskab & teknik Verden på

**Blotter med meget hvide ben**

Nordjyllands Politi leder efter en blotter med meget hvide ben

18:41 - 23. aug. 2010 | Filip Wallberg

Nordjyllands Politiet er lige nu på jagt efter en 20 til 25 årig mand med meget hvide ben, der er sigtet for blufærdighedskrænkelse i Sæby. Det skriver nordjyske.dk.

To piger på 19 og 20 år mødte manden ...ndag morgen, da han sprang ud foran ...me og begyndte at ...

Del 148

Ekstra Bladet Krimi

Dáma 1,222

Vejret i Danmark lige nu...

## Man tað vera ein føroyingur?

Onkur á heimasíðuni nym.fo hevur funnið hesa yvirskriftina í Ekstrablaðnum og sigur seg hugsa møguleikan, at tað kanska er ein føroyingur...

## Í RANGASTRÚPAN

**Ikki ferðalið longur**
Ferðaliðið kannar enn
*Portal.fo*

**Er tað føroyska túnatosið?**
Eitt nýtt sosialt netverk er um at vera klárt til at taka dystin upp við Facebook.
*Dimma*

**Nei, aldrin í verðini!**
Stjórnmálafrøðingur: Samgongan slitnar ikki
*Kringvarp.fo*

**Løgtingsfólk fáa terapi**
Gerhard Lognberg spyr landstýrismannin Aksel Johannesen um ergoterapiuna á Løgtingi mikudagin
*Tíðindaskriv*

**Summ allir aðrir bankar**
Eik vil hava sítt
*Dimma*

**Eingin vandi í Føroyum!**
Ávara um hita í Spania
*Portal.fo*

**Hann er bara 44 ár**
Gamal sjúkrahússtjóri aftur leiðari
*Dimma*

**Sigur tað seg kanska sjálvt?**
Hóast Rúsdrekkasøla Landsins hevur hækkað prísirnar fyri at fáa fleiri inntøkur, hevur tað ikki eydnast.
*Kringvarp.fo*

**Summi fara niður í løn**
Ringar vónir um at fáa lønarhækking
*Krinvarp.fo*

**Eftirlýsing!**
Svensk lið horvin úr Evropa
*Dimma*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Friðarlig góðdýr

Vit føroyingar eru friðarfólk. Vilja bara hava frið, frið. Løgið er tað tí, sigur onkur, at ikki nógv fleiri vóru við í Fólki fyri friði, tá heitast var í kalda krígnum.

Nei, tað er einki løgið ella ólogiskt. Tí tað er ikki soleiðis at skilja, at føroyingar eru friðarfólk.

Friðardýrini, sum borgaraligasta pressan, vit hefta onga ismu upp í hana, kallaði tey, sum billaðu sær inn, at til bar at loysa stórar og drúgvar trætur við øðrum uttan vápnum ella hóttanum um vápn.

Nei, tí føroyingar eru ikki friðardýr, men góðdýr. Lata sær alt lynda. At onnur drepa hvønn annan í Langtburturistan kemur ikki okkum við.

Onkur, sum saknar spenning í gráa gerandisdegnum, ella hevur sæð ov nógvar amerikanskar krígsfilmar og/ella spælt ov nógv videospøl úr somu verksmiðju, fer av stað. Men annars...nei, hatta rakar ikki okkum.

Tá Føroyar vóru hersettar í fimm ár, lótu føroyingar sær tað lynda. Gamaní vóru okkurt hissini mótmæli og onkur yvirlýsing í fyrstani, men so var alt í lagi. Tað lagaði seg. Tað gekk nokk. Øll onnur plaga at berjast við hersetingarvald.

Vit orka ikki ella tora ikki ella tíma heldur ikki so frægt sum at manna (heldur ikki kvinnurnar) okkum upp til eitt frælsisstríð móti aldagamla kolonivaldinum. Aktuelli koloniharrin er so fittur, hevur føroyska konu, skilur føroyskt og etur turra grind.

Ja, hvussu skal tað vera? Øll, sum rópa harðast og skriva hvassast um frælsi, eru gift. So tey vilja neyvan hava nakað frælsi, tá tey sjálvboðin lata frá sær frælsið, enntá í einari kirkju. Og so omaná skamma teir prestar, sum nokta at taka frælsið frá sama fólki aðru ella triðju ferð.

Nú í ein mánað er eitt skip hjá Paul Watson og hansara harkaliði ótarnað sloppið at sigla millum hvalvágirnar at leggja grindastyggjarar. Eingin í Føroyum, heldur ikki danska politiið ella danska sjóverjan, ger nakað fyri at styggja hetta sjorænaraskipið út um 200 fjórðinga markið.

Tá Greenpeace, sum ikki er ein militantur ágangsfelagsskapur, hevði eitt av sínum skipum onkra staðni millum 60 og 65 stig, vórðu skundboð send eftir donskum ramboum, tí eitt útlendskt oljufelag var kanska í vanda.

Men ein ribbaldur úr Kanada og ein boppurumpublondina úr Fraklandi eru saman farin í kríggj móti Føroyum. Og eingin letst um vón. Minst av øllum føroyingar.

Manningin á hesum skipum, sum verja hval, tí hann er so fittur og klókur og etur fisk, er yvirhøvur úr londum, har sum tað er ítriv, væl lønt arbeiði ella eitt kall at drepa, drepa fólk.

Tey eru úr londum, sum leypa á onnur lond, eftir at forseti ella forsætisráðharri teirra hevur slongt út eina lygn um hesa og hasa hóttanina móti heimsfriðinum og tí siviliseraða heiminum, hvør fanin hann so er, USA kanska.

Fólk, sum stovna djóraverndarfelagsskapir og umhvørvisverndarfelagsskapir, eru ríkfólk, sum keða seg. Tey sakna spenning. Tað er so strævið at eiga nógvar pengar. Tey, sum tað gera, fara at keða seg. Og so enda tey sum søkkandi skútur í fríum falli á brennivínshavinum ella missa seg skelvandi burtur millum strípurnar á størsta pengaseðlinum.

Hini, sum duga at stýra uttanum fløksur og súgvirør, fara at verja hval ella áir. Tey fara ikki at verja fólk móti týning.

Og tað allarringasta er, at hesar herferðir gerast krossferðir, tær gerast religiøsar. Tá eiga vit at ansa serliga væl eftir sum altíð, tá um religión ræður. Tí tá er fanansskapur uppií og einki friðskjól fyri góðdýr.